VIÐMERKINGAR

# Framtíðin liggur har ið skyldan liggur!

**tórbjørn jacobsen**
*løgtingsmaður*



Tað er einki nýtt undir sólini. José Marti, kendur karibiskur yrkjari og frælsisstríðsmaður í stríðnum móti spanskari kolonialismu í Kuba í 19´ øld sigur einastaðni: "Ein rættur maður hyggur ikki eftir hvarið hann nú einaferð kann liva sum best, men hvarið skylda hansara liggur. Og hin veruliga praktiski maðurin er hann hvørs dreymar ídag, eru vorðnir lógir ímorgin. Tey, ið hava skeitt eftir søgunnar gongd og hava staðfest hvussu menniskja ígjøgnum árhundraðir hevur stríðst og barst fyri sínum rættindum vita sjálvandi at framtíðin, uttan undantak, liggur harið skyldan liggur."

Og skyldan hjá føroyskum sjálvstýrismonnum er at laga eitt dygt klípið uppí føroyska statsvarðan hvønn einasta Guðs skapta dag. Tjóðarbyggingin er hálvtannaðhundrað ára gomul. Og 1998 má sigast at vera hvarvið harið hon av álvara kom inn í sína endaligu politisku fasu. Dyggari og veikari, tað má so verða tá ið út við helmingurin av litraðnum hugsar og ber seg at sum politiskir miðaldarfossilar. Men eingin fær steðgað gongdini, søguligi djúphavsstreymurin er ov tráður og máttmikil. Tí ræður um at fyrireika seg væl framat tí degi táið republikkin er ein veruleiki.

Fólkið hevur givið sitandi samgongu vald og mandatið til at leggja til rættis hesa búning. Politisk landnám eru ein partur av hesum, og tað fræltist, at virkað verður í løtuni við eini yvirtøkulóg, sum fólkið eftirhondini er farið at leingjast eftir. Kanska løgmaður ella varaløgmaður, ella báðir, kundu greitt tinginum frá hvarið málið liggur og hvørið substansurin ætlast at verða í hesi lóg. Gongur hon framí loysingina ella er ætlanin bara at høsnast framhaldandi, innanvert heimastýrisstikið, hetta valskeiðið á tamb? Búskapur og fíggjarstýring er ein partur av viðføribum á hesi slóð. Og landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur so sanniliga ikki ligið á latu síðuni hesar seinastu mánaðirnar.

Hugsaði um hetta mánakvøldið í einum kykmyndaskála í Keypmannahavn harið filmurin El Commandante rann eftir tjaldinum. Oliver Stone spyr Fidel Castro hví hann ongantíð barberar sær? Og hann svaraði skemtandi og prompte: "Havi ikki havt stundir til tess, havi eisini roknað út, at um eg hevði havt brúkt eitt korter um dagin til at raka mær í hesi 44 árini, eg havi sitið við valdinum, so høvdu góðir fimm hundrað arbeiðsdagar verið farnir fyri einki, og tá ið eg ongantíð havi havt stundir til at at tikið mær av løttum og ongantíð havi nakra frítíð, so skilir tú at hetta als hevði ikki borið til." Karsten Hansen hevur harafturímóti verið úti við rakiknívinum, hevur barberað sum frægast, nú innløgurnar gjørdust ódrúgvari, fyri eina tíð, og tað er ikki ov nógv sagt, at hann er bara komin væl frá uppgávuni. Lat seg ikki taka av fótum, og stendur við hesum uppskotinum á tryggari grund. Við einum yvirskotið og eini skilagóðari umlegging av skuldini til danska ríkiskassan. Vónandi eitt dygt átak framímóti endaligu uppgerðini um ríkisveitingina, sum er meginforðingin ávegis til fulla politiska frælsi føroyinga. Og sum er tilverugrundarlagið hjá politiskum miðaldarfossilum í Føroyum og hjá ríkiskolonialistunum í Keypmannahavn.

Tað var greitt, longu undir fíggjarlógarviðgerðini í fjør, at samfelagsbúskapurin var komin í eina niðurgongu. Rep máttu takast í seglini. Og tað tykist sum meiri álvari nú er í politisku skipanini, soleiðis at teringur verður settur eftir neringi. Tað ber uppskotið ið hvussu er brá av.

Røddir, eitt nú úr Búskaparráðnum, hava fyrr í ár verið frammi við tí hugsan, at ongin vandi var við eini hallgevandi fíggjarlóg. Tað kann tað vera nakað um. Tað valdast umstøðurnar. Og sum so er hetta ikki nøkur nýuppfunnin fatan av skilagóðum búskaparpolitikki. Leitast skal heilt aftur til John Maynard Keynes og hansara ástøði General Theory of Employment, Interest end Money frá 1936, sum koppaði og ikki minst skakaði, allari búskaparvísind, ið fram til tá hevði verið ráðandi í framkomna heiminum. Aðrir tóku ástøðina til sín, og teir mest kendu munna vera William Beveridge og sviin Gunnar Myrdal. Aðaltátturin var, at samfelagið, staturin, skuldi taka broddin av sveiggjunum í niðurgangandi konjunkturum, ella kreppum, við at økja um eftirspurningin, hóast hetta í ringasta føri kundi hava við sær, at hall á fíggjarlógini gjørdist ein partur av hesum átaki. Helt samfelagið hjólunum gangandi á henda hátt, í fíggjarliga strongdum tíðum, kom peningurin innaftur av øktari framleiðslu og meira virkni úti í samfelagsins kyknum, serliga um samfelagsins tilfeingið varð javnað ímillum fólkið - ið sjávandi hevði økta nýtslu við sær.

Hóast vit hava verið inni í eini niðurgongd í dastið av einum ári, so ber illa til at tosa um nakra kreppu. Arbeiðsloysið er at kalla einki, og longu nú eru tekin um, at gongdin er batnandi aftur - yvirhøvur. Fleiri alibrúk framleiða nú aftur við yvirskoti, rækjuprísurin kvinkar uppeftir og menn eru ikki heilt so svartskygdir um upsan, sum teir hava verið. Harvið eru áneyðirnar fyri innsprænningum og stimulansi frá almennari síðu ikki serliga stórar, sum støðan er í løtuni. Harafturat eigur ein sjálvstýrissamgonga at virka eftir tí veruleika, at í fíggjarlógaruppskotinum er eitt de facto undirskot á 615,5 milliónir krónur. Imperialistiska eitrið, ið má og skal lagast niður við uppgongdini sum kemur og við skynsomum og sparnum fíggjarpolitikki. Og ikki minst við einum meira offensivum vinnupolitikki, sum lyftir seg uppum og útum natúrligu tilfeingisvinnunar. Ein skilagóð umskiping av ognarviðurskiftunum er eisini bráneyðug, hetta sum liður í ætlan at gera samfelagið meira smiðligt, rationelt og sjálvberandi. Ætlanin um búskapargrunn, sum nú er frammi aftur, er ein skilagóð loysn í so máta, ein framtíðar stabilisatorur í teimum frælsu Føroyum.

Funnist verður dagliga at politisku skipanini og kanska serliga samgonguni, sum nú situr. Tað vil so vera. Men líta vit aftureftir, við bara so rímiliga objektivum glaseygum, so ber illani til at siga annað enn tað, at nógv er broytt til tað betra hesi seinastu árini. Ikki minst vatntætta skottinum millum vinnulívið og landskassan fyri at takka. Var hetta ein fíggjarlóg í áttati árunum, tá ið blandingsbúskapurin livdi sítt sáliga og søta lív, og høvuðsvinnan seyp eina milliard úr felagskassanum um árið, hvussu skuldu politisku raðfestingarnar tá verið? Tær somu, ja, so høvdu áneyðir verið at fari út lánimarknaðinum eftir undirskotinum og drátturin fram ímóti eini nýggjari meginkreppu var aftur mentur. Ístaðin gongur leiðin nú framímóti sjálvberandi búskapi, sjálvbjargni og politiskum frælsi.

Andstøðan sjálv er nú eisini farin at ivast í sær sjálvari sum andstøðu. Ákærir samgonguna fyri at vera bæði samgonga og andstøða, og formaður javnaðarfloksins hevur alment kært seg um, at eingin tímir at lurta eftir honum longur, tíansheldur at nakar fjølmiðil gevur nøkrum gætur sum hann og andstøðan royna at varpa fram í ljósið. Sum frá líður keðast fólk kanska av mjarri og gemenum grenji. Og lítið konstruktivum virkni á politiska leikpallinum. Og at vænta, at teir fýra samgonguflokkarnir partú skula vera samdir í einum og øllum, tað er ið so nógv at krevja. So ymiskir teir eru. Men harfyri eru teir í høvuðsheitum vorðnir samdir um hetta fíggjarlógaruppskotið og eisini um at gera raðfestingar á samfelagsins meginøkjum, botnurin undir framtíðarsamfelagnum, á heilsu, - almanna, - undirvísingar, - & mentanarøkinum. Hartil hava løgur í undirstøðukervið fingið eitt rættiligt spark í afturpartin hesi seinastu árini - ikki minst í hesum uppskotinum.

Alfred Hitchcook var einaferð steðgaður í tollavgreiðsluni í Heathtrow floghavnini í London. Maðurin í tútahúgvuni, sum ikki kendist við hann, spurdi hvørið hann var og hvat ið hann tókst við dagligani? Alfred vísti honum eyðkenniskortið. Alfred Hitchcook, producer. Ná, hvat produsera tygum so? Gásarhold, svaraði hin kendi filmsmaðurin so sarkastiskt.

Í stóran mun mundi tað eisini vera leikluturin hjá fíggjarnevndini í fjørheyst. Soleiðis sum útlitini longu tá vóru, var neyðugt at fara inn á konto fyri konto fyri at finna hvørt oyra sum kundi sparast burtur. Og tað vóru tey, ið vóru illa herjaði av gásarholdi hesa tíðina, eisini samgongumenn, men holdið mundi tó slætna tann dagin fyri jól, tá ið 30 tingmenn atkvøddu fíggjarlógina ígjøgnum. Og í ár hava fyrireikingarnar verið so mikið dyggar, at óneyðugt skuldi verið at farið so rívan til verka aftur. Tó, okkurt nosið man fara at taka seg upp í tíðini hiðani og til jóla. Tað man fáur ivast í.

Hann savnaði Kina, men man nú vera mest kendur sum ein hin mest grimdarhugaði tyrannur, ið hevur livað. Mao Tse-Tung, sáli og fyrrverandi formaður kinverska kommunistafloksins. Í lítlu reyðu bókini sigur hann í einari strofu, at flestu menniskju eru sum eiturkoppurin, ið endaði á botni í súrhoyggjabrunninum og var sannførdur um, at tað var allur heimurin sum sást upp ígjøgnum kjaftin á brunninum. Tey vísu mega duga at skyna á, at hetta er bara ein evarska lítil partur av alheiminum. Hetta verið sagt fyri at ávarða ímóti ov nógvum snævurskygni og ov strammum lokalum gamasjubrókum nú tá ið fíggjarlógarviðgerðin av álvara fer av bakkastokki. Eingin skal ivast í, at allir samgongumenn mega stuðla uppundir balansugongdina, soleiðis at uppskotið ber ígjøgnum, bara soleiðis eru Føroyar framhaldandi á fullveldiskós, føroyskir sjálvstýrismenn spelandi undan íhaldinum og kolonikallunum í ríkisborgini við Oyrasund.

Framtíðin liggur harið skyldan liggur. Dreymarnir ídag eru lógarverk ímorgin. Sjálvstýris- & samgongumenn eiga skyldina, dreymarnar og harvið framtíðina. Sum, um tú vil tað ella ikki, er republikkin Føroyar. Hann ið ikki hevur fata hetta, heldur bara fram við at spadsera aftur og fram eftir banjaranum í súrhoyggjabrunninum, eins og eiturkoppurin hjá Mao formanni.

---

*Framhald av síðu 11*

arnar úr ríkiskassanum til ávikavist Føroyar og Grønland, sum nakra olmussugávu; teir siga tvørtur ímóti, at endamálið við heildarveitingunum er, at tryggja sama livifót í øllum pørtum av ríkinum.

Talan er sostatt um eina samhaldsfasta ella solidariska skipan í einum ríkisfelagsskapi. Talan er um eina útjavningarskipan.

**Sjálvberandi búskapur**

Sjálvandi vil javnaðarflokkurin hava ein sjálvberandi føroyskan búskap. Tað er og verður altíð okkara endamál og okkara stavnhald, men tíðin var ikki komin til tess, at vit kundu skerja heildarveitingina við 366 mió. kr.

Taka vit fyrst almanna- og heilsuøkið, so er stórur tørvur á íløgum, bæði tá talan er um almannaverkið og heilsuverkið. Eg kann nevna íløgur í ellis- og røktarheim, í eldra sambýlir, í eldra bústaðir, umframt størri játtan til heimarøktina. Heilsuverkið hevur tørv á størri játtan, bæði til íløgur, viðlíkahald og rakstur.

Løgtingsins fíggjarnevnd hevur vitja á sjúkrahúsinum seinastu árini og við egnum eygum hava fíggjarnevndarlimirnir sæð tann stóra tørvin á játtanum, bæði til viðlíkahald og til íløgur. Eisini kann eg nevna tørvin á at byggja íbúðir til sálarsjúk og til menningartarnað. Somuleiðis tørvin á at byggja eldraíbúðir, vardar íbúðir og røktarheim. À samferðsluøkinum er eisin stórur tørvur á íløgum.

Eitt samfelag, sum ikki megnar at røkja grundleggjandi tænastur til borgarnar, hevur ikki ráð at frásiga sær inntøkur, sum í hesum førinum 366 mió. kr. um árið.

Eg skal enda við somu orðum, sum eg endaði framsøgurøðuna við fyri einum ári síðani. Tá segði eg, at hóast framlagda fíggjarlógaruppskotið, eftir okkara tykki hevði nógv og álvarsom brek, so vildi javnaðarflokkurin kortini bjóða til eitt breitt og dygdargott samstarv í fíggjarnevndini.

Endamálið við teirri útrættu hondini frá javnaðarflokkinum var, at vit skuldu bøta um brekini í framlagda uppskotinum, soleiðis at vit aftaná viðgerðina í fíggjarnevndini kundu fáa eina fíggjarlóg fyri komandi fíggjarár, sum kundi verða føroyska samfelagnum og øllum fólkinum til størst møguligt gagn.

Hetta tilboðið seta vit eisini fram í ár. Landið skal hava eina fíggjarlóg, og ábyrgdarfullur, sum javnaðarflokkurin altíð er, vil hann sjálvandi samstarva við allar flokkar um hetta álvarsama, sera stóra og týdningarmikla mál.

---

VIÐMERKINGAR

# Dálkaðir ella gedignir føroyingar

**Virgar T. Dalsgaard**
*føroyskur útiseti*

Verið nú ikki fyri! Haldið tykkum nú øll føst! Verið tykkum, serliga øll *óføroysk* ella *órein* element!

Tí nú, ***beint nú*** skal tað avgerast, hvør ið er *juridiskt reinur* føroyingur, proklamerar varaløgmaður, harra Høgni Hoydal í bombastiskum orðalagi í bløðunum seinasta hósdag.

Higartil hava vit aðrir, satt at siga hildið, at tað mest hevur verið hansara egna *privata og grammatiska problem!* Men nei, nú fáa vit at vita, at tað er hetta, sum nívir *alt* okkara fólk og forpestar gerandisdagin, uttan at fólkið veit av tí, og teir pannurukkandi og djúpt *disputerandi* grundlógar-smiðirnir eru fólkarættsliga bekymraðir um, hvussu man effektivt skal sortera føroyingar frá restini av mannaættini, og serstakliga frá dønum.

Tí bara ektaðir, fullblóðs og rættstempladir landsmenn kunnu vænta sær nøkur borgararættindi í eini komandi heilstoyptari føroyskari republikk. Sostatt er tað at vera føroyingur nú reduserað til ein definitiónsspurning, og tað hevur ikki nakað við mentan og siðmenning at gera longur. Men tann *endaliga loysnin* er hárfínt problematisk, og eksakta definitiónin er subtil og kundi ætlandi givið einum dusini av juraheysum arbeiði til eina hálva øld. Neyðugt hevur tí eisini verið at leita sær serkøna uttanlands hjálp.

Etnisk viðurskifti eru trupul at definera, tí átti heimastýrislógin aldri at gjørt tað, men nú vilja menn gera sama feilin umaftur – tað *skal* definerast! HVÍ 1 - At definera ein føroying er ikki hvønnmansføri, serliga ikki, um vit skulu fáa allar loysingarmenninar upp í leypin.

T.d. er eitt *geografiskt* kriterium heilt óbrúkiligt, tí so koma bæði varaløgmaður og meginparturin av hansara familju í vanda og falla heilt uttanfyri, tí tey flestu av teimum eru donsk og uppvaksin í útlegd – sjálvur er varaHøgni føddur í Danmark og uppaldur í einum donskum Maobarnagarði.

Eitt *málsligt* kriterium dugir heldur ikki, tí um vit skuldu farið og eksamineráð fólk til borgararættindi, so høvdu hópin av oddamonnunum í loysingarrørsluni dumpað, tí teir málbera seg so illa á føroyskum, og nógvir, eitt nú varaløgmaður, hava ongantíð fingið bendingarhylling á hvørki hvørjumella hvønnfalli.

Eitt ekstremt *tekstil kriterium* hevði kanska verið vert at umhugsað, so sum *uniformering* í koti ella føroyskum búna – hetta hevði havt tann fyrimun, at man slapp av við nógvar javnaðarmenn, sum hvørki krógva seg í koti ella eru andliga skøddir í húðarskóm.

Fyri góðum tveimum árum síðani var varaHøgni við fleiri disiplum yvir í Reykjavík og forhoyrdi seg um sín uppruna og nationala identitet! – Hetta var sjálvt hjá íslendingum torfør diagnosa at stilla, men minnist meg rætt, haldi eg, at ein íslendskur professari aftaná gjølliga og nágreiniliga kliniska kanning kom til tað úrslit, at Høgni H. *allarhelst var* føroyingur, men hann kundi vist ikki garantera nakað, – ikki eitt hundrað prosent, ið hvussu so er! Men sjálvur var Høgni H. bæði errin og ovurfegin, og tá ið hann kom heim aftur úr Íslandi, trúttaði hann inn í eyguni á bæði Jóannesi Eidesgaard og tí forundraðu donsku stjórnini, at hann var superføroyingur! Tað var ikki bara Jóannes Eidesgaard, sum sá skeptiskur út! Fólk yvirhøvur vóru ovfarin, málleys og stórbilsin!

Hetta var ein so grotesk og parodisk operetta, at sjálvt ortodoksir tjóðveldismenn skammaðu seg yvir sín fjákuta floksførara.

Slík ábyrgdarleys og studentikos orðaklúgving, trætan ella møsn hjá óroyndum politiskum kannustoyparum og grunnum amatørum í politiska handverkinum var og verður ørkisleysur heilafimleikur fyri triðja-rangs juristar, – fyri onnur er tað tíðs spilla, tí fyri matematiskt- og logiskthugsandi ella vaksin fólk er tað sjálvandi ógjørligt at definera ein føroying sum eitt *juridiskt* fyribrigdi, og tað skal heldur ikki gerast – tí tað er og verður ein *etniskur* spurningur.

**Søgulig Holberg-analogi**

Annars frætti eg í gjár frá einum skyldmanni, at sjónleiksbólkur í Havn er við at brynja seg til at spæla skemtiliga Holberg-leikin *Erasmus Montanus* um stutta tíð. Tað má sigast at vera sera aktuelt – haðani kunnu grundlógar-stoyparar heimta sær nógva inspiratión! Tí í hesum sjónleiki síggja vit besta dømið um ein studentikosan fantast, sum er so bitin av at disputera og klúgva orð, at hann nærmast hevur kvett og kvittað við allan veruleika rundan um seg. Hann resonnerar í sonevndum *syllogismum* (trí-býtt, og trílinjað resonnement heilt frá Aristotelessar tíð við tveimum premissum og síðani konklusión).

Fyri at nevna eitt dømi, eg ørminnist frá Erasmusi, so forskrekkir hesin bannsetti letingi mammu sína við fylgjandi syllogismu:

En sten kan ikke flyve.
Morlille kan ikke flyve.
*Ergo* er morlille en sten.

Men tá ið mamman, sum ikki er universitetsútbúgvin akademikari, fer at gráta, bjargar Erasmus henni næstan alt fyri eitt við fylgjandi drepandi syllogismu:

En sten kan ikke tale.
Morlille *kan* tale.
*Ergo* er morlille *ikki* en sten

Loyva vit okkum eina lítla analogi til føroysku grundlógar-naggatódnina, har ovurlærdir esoteriskir menn sita í sveittabroti og definera, meðan teir elta sínar *yvirbelastaðu* heilacellur við hvørjum juridisk um stavilsi og hvørjum kúgvandi komma, sum skal vigast og umhugsast, áðrenn tað kann koyrast í tað lidna grundlógar-deigg ið, ja, so er tað nærliggjandi og av evsta republikanska týdningi, at vit royna at assistera heila-trustin við fylgjandi serføroyskum syllogismum, sum kanska kundu sloppið tí illa sperdu grundlógar-manningini úr kriterii-kreppuni.

Ein dani dugir ikki at benda
Harra Høgni H. dugir ikki at benda
*Ergo* er harra Høgni H. avgjørt dani.

Men *bíða nú* – tað er eingin grund til at kúra, eingin orsøk til tjóðveldisgrát ella tannagrísl enn – tí beint oman á hetta illavorðna filologiska argumentið kemur tann evsta føroyska intelligens-reservan til hjálpar við rótføroyskum kirkjubíggjarlogikki.

Ein dani tímir ikki at ganga í koti.
Harra Høgni H. spákar dúgliga í koti.
*Ergo* er harra Høgni H. *yvirhøvur ikki* dani.

Nú eru tær disputerandi og definerandi grundlógarhetjurnar sissaðar, ja, beinleiðis ovurfegnar, og tað verður dansur alla náttina í grundlógar-klubbanum. Og soleiðis kann tann grunni grundlógarsjónleikurin halda fram til langt eftir at plakatirnar til Holbergleikin eru tiknar niður!

Skuldi hetta ikki verið ein gongd leið, kunnu menn mynstra við eini heilt aðrari slupp og leita sær søguliga inspiratión frá teirra undangongumonnum í sjálvstýrislandsstýrinum, fyrst í trýssunum. Teir skuldu eisini eitast at vera vaksnir menn, og ikki óvitar!

**Føroysk politisk analogi**

Tað neyðars Sjálvstýris landsstýrið 1962-66 hevði nevniliga eisini leingi baksað við einum uppskoti um borgararættindini í sambandi við, at teir vóru so illa til passar av donskum ferðabrævi, at teir vildu hava nýtt serføroyskt pass og broyta táverandi heimastýrislógina, men tað sindrið av tíðini, tá ið teir *allir* vóru edrúir, bardust teir so illa, at teir ongantíð kundu semjast um, hvussu man skuldi definera føroyingin, serliga tí, at so nógvir av teirra veljarum jú reelt vóru føddir í Danmark og tí etniskt vóru danir ella bara naturaliseraðir føroyingar. Tessvegna kom blaðið Rukkulakkin í Klaksvík teimum á møti við at prenta niðan fyri standandi uppskot um borgararættindi, sum javnaðarmaðurin og blaðskemtarin *Villi Sørensen* segði seg at hava beinleiðis úr Tinganesi (Rukkulakkin 1964). Hetta verður hervið citerað orðaraðið til inspiratiónar fyri illa staddar, definitións-sperdar og grunnar lógarmenn í dagsins aktuellu kreppustøðu:

» § **Borgararættindi §.**

a) Føroyingar *eru* allir føroyingar, sum eru føroyskt føddir, t.v.s. føddir í song við madrassu, fylt við førføroyskum hoyggi (súrhoyggj undantikið) og dýnu, fylt við havhestafjøður – í Føroyum.
b) Børn, ið hava útlendskan- ella ongan pápa, hava ikki borgararætt í Føroyum.
c) Børn, ið hava útlendskaella onga móður, hava danskan borgararætt.
d) Børn, fødd av foreldrum, sum bæði eru føroysk og fødd av føroyskum foreldrum, fødd í føðilandinum ella á føroyskum sjóøki ella *undir* føroyskum himmali, eru føroyingar og hava føroyskan borgararætt.
ð) *Astronautar,* ið føddir eru í føroyskum himmaløki, hava *ikki* føroyskan borgararætt, men *kunnu* fáa hann í samráð við *nevndina fyri útrudding av kópi og ravni* – um hon ikki noktar.

--------------------

ø) Børn hjá *sonnum* føroyskum *fosturlandsvinum*, annaðhvørt teir eru staddir í Danmark ella Congo, hava *sjálvskrivaðan* føroyskan borgararætt«.

§ Viðmerking: *Nevndin fyri útrudding av ravni og kópi* var ein av teimum genialu kommissiónunum, sum landsstýrismaðurin, Karstin Hoydal hevði fingið etablerað! Hetta skjótt 40-ára gamla uppskotið kann ómøguliga vera meira fjákut ella forskrúvað enn tað møsnið, sum grundlógar-klubbin situr og barslar við í løtuni.

Í dag er málið etniskt einfalt, *hóast* alla jura; – eingin er í iva um, at útisetar, eitt nú eg sjálvur, eru føroyingar, sum búgva í Danmark (t.e. ein etnisk definitión), og donsku tjóðveldiskonurnar í Havn eru danskarar, sum búgva í Føroyum. – *Voilá!*

Men ætla menn veruliga at halda fram við teirra vitleysa definitións-møsni, ja, so gerst úrslitið, um fullveldið verður trúttað ígjøgnum, at vit útisetar verða danskarar, meðan allar tær donsku tjóðveldiskonurnar og eventuellir danskir tjóðveldismenn við gerast føroyingar! – *So* stupidur er tjóðveldislogikkur! Og so groteskt láturligur er føroyskur politikkur! – Er tað løgið, um fáur satirikari hevur hegni til at kappast við veruleikans operettu longur?

*8. oktober 2003*

---

# Íslandsflúgvingin

TÍÐINDASKRIV
*Atlantic Airways*

Á farleiðini millum Føroyar og Ísland fara samstarvsfelagarnir Air Iceland og Atlantic Airways at økja um útboðið av ferðatilboðum. Í fyrsta umfari verður flúgvingin umskipað í vetur, so BAe-146 flogførini hjá Atlantic Airways verða brúkt til flúgvingarnar, bæði fríggjadag og mánadag. Tá verður pláss fyri eins nógvum fólkum á fráferðurm fríggjadag og heimferðum mánadag.

Feløgini hava umhugsað at økja túratalið til tríggjar ferðir um vikuna, men enn tykist grundarlag ikki verða fyri hesum um veturin, men veksur undirtøkan fyri flúgvingini til várs er hugsandi, at eitt Fokker 50 flogfar hjá Air Iceland flýgur eina fráferð mitt í viku til várs.

Samstarvið millum feløgini um flúgving millum Reykjavík og Narsarsuaq í Grønlandi heldur fram komandi summar. Flogið verður tvær reisur um vikuna - týsdag og fríggjadag - frá miðjan juni til fyrst í september.

Air Iceland og Atlantic Airways arbeiða í løtuna við at endurskoða prísirnar fyri ferðing millum londini og rokna við at kunngera nýggjar prísir seinni í mánaðinum, sum vónandi fara at fáa fleiri fólk at ferðast millum Føroyar og Ísland.